# Fráboðan um tekningarlistar liggja frammi
## í samband við hækkan av partapeninginum í P/F Smyril Line

Vísandi til ásetingarnar í grein 34 í partafelagslógini boðar P/F Smyril Line (reg. nr. 544) við hesum frá at tekningarlistar liggja frammi á skrivstovu felagsins J. Broncksgøta 37, 100 Tórshavn í sambandi við at felagið á aðalfundi tann 9. juni 2005 tók hesa avgerð um hækkan av partapeningi felagsins:

1. Partapeningur felagsins verður hækkaður við upphædd í minsta lagi stórari danskar krónir 2,7 milliónir og í mesta lagi upphædd stórari danskar krónir 120 milliónir í nominellum virði, hetta við tekning av nýggjum partapeningi.
2. Nýggi partapeningurin fær somu rættindi í felagnum sum verandi partapeningur. Einki uppbýti av partapeninginum í klassar verður.
3. Hvat viðvíkur upphæddini teknast skal í nýggjum partapeningi, so kann tekning fara fram soleiðis:

   A. Ímóti kontantum gjaldi kann tekning fara fram fyri upp til danskar krónir 57,018 milliónir - sí tó undir pkt. 3 C.

   B. Hvat viðvíkur upphædd upp til og við danskar krónir 62,982 milliónir, so kann tekning fara fram við mótrokning í skuld (skuldaumskipan) heilt ella lutvíst sum felagið í løtuni hevur til hesar ognarar (uppgjørt við støði í kursinum kr. 7,44 pr. EURO og kr. 10,83 pr. GBP og við rentutilskriving pr. 9. juni 2005) og kunnu nevndu ognarar soleiðis (við skuldaumskipan) tekna partapening við upp til teirri upphædd nevnd er yvirav navni teirra (avrundað):

   | | |
   |---|---|
   | Framtaksgrunnur Føroya, Tórshavn | kr. 32.999.000 |
   | TF Holding P/F, Tórshavn | kr. 19.179.000 |
   | Austfar ehf, Seyðisfjørður | kr. 8.056.000 |
   | Shetland Development Trust, Lerwich | kr. 2.748.000 |
   | íalt | kr. 62.982.000 |

   Skuldin til Shetland Development Trust er íkomin sambært lániskjali dagfest tann 19. og 21. februar 2005, fyri gjaldførisláni á GBP 250.000.

   Skuldin til Framtaksgrunn Føroya, TF Holding P/F og Austfar stavar frá hesum:
   a) lániskjali dagfest tann 5. april 2005 fyri lán á EURO 3.500.000 frá nevndu kravánarum.
   b) lániskjali dagfest tann 28. apríl 2005 fyri lán á kr. 20,0 mió. frá nevndu kravánarum.
   c) Deferred Payment Agreement dagfest tann 6. apríl 2003 og við amendment til lániskjalið frá nevndu kravánarum dagfest tann 28. apríl 2005 er lánið ásett til EUR 1,85 milliónir og umlagt til ábyrgdarlán.

   Í tann mun kursumrokning skuldi gjørt tað neyðugt, verða upphæddirnar í hesum pkt. 3 B at regulera samsvarandi, bæði hvat viðvíkur upphæddini boðið verður til tekningar og tann upphædd teknað máttið verið. Endaliga teknaða upphæddin við skuldaumskipan verður grundað á tann kurs galdandi er tann dag teknað verður.

   C. Í tann mun rættur undir pkt. 3 B til at tekna partapening við skuldaumskipan ikki er ella bert lutvíst er nýttur tá tekningarfreistin er runnin, verður tann upphædd teknast kann við kontantgjaldi at hækka við teirri upphædd ikki varð teknað við skuldaumskipan, soleiðis at samlaða teknaða upphæddin í nýggjum partapeningi ikki kann fara uppum kr. 120 milliónir.

   Hvat viðvíkur tí partapeningi teknaður verður við kontantgjaldi, so hava verandi partaeigarar fortekningarrætt, tó við teirri avmarking, at eingin kann tekna seg fyri lægri upphædd í nýggjum partapeningi enn danskar krónir 300.000,00.

   Hvat viðvíkur tí partapeningi teknaður verður við skuldaumskipan, so hava verandi partaeigarar ikki fortekningsrætt.

   Teknaður partapeningur er gjaldkomin samstundis sum teknað er. Hvat viðvíkur tekning av partapeningi við skuldaumskipan, so fer henda umskipan fram samstundis sum teknað verður.

4. Við yvirtekning ger nevnd felagsins frítt av hvussu tann til tekningar innboðna upphædd, ið ikki er teknað við støði í fortekningarrætti ella við skuldaumskipan, verður býtt millum teir teknað hava.
5. Tekning fer fram í tekningartíðarskeiðnum frá týsdag tann 28. juni 2005 til og við fríggjadagin tann 30. september 2005 kl. 16.00 (føroyska tíð) og fer tekning fram á tekningarlistar, ið liggja frammi á skrivstovu felagsins J. Broncksgøta 37, 100 Tórshavn. Fortekningsrættur skal vera nýttur frá lýsing er farin fram eftir § 34 í partafelagslógini í seinasta lagi 21 dagar áðrenn tekningarfreistin rennur út til og við 30 september 2005 kl. 16.00 (føroyska tíð). Fortekningarrættur verður eisini nýttur við tekning á tekningarlistar á skrivstovu felagsins J. Broncksgøta 37, 100 Tórshavn.
6. Partabrøvini skulu ljóða uppá íhendihavara og eru negotiabul.
7. Eingi partabrøv hava framíhjárætt og partaeigararnir hava ikki skyldu at lata partabrøv síni innloysa. Nýggi partapeningurin fær sín vanliga lutfalsliga forrætt til at tekna nýggjan partapening í felagnum í sambandi við kapitalhækkingar í felagnum í framtíðini.
8. Partabrøvini kunnu frítt verða seld uttan loyvi frá nevndini.
9. Partabrøvini eru til støddar kr. 1.000,00 og multipla av hesum.
10. Tekning fer fram til kurs 100 (kurs pari).
11. Nýggju partabrøvini fáa rætt til vinningsbýti í sama roknskaparári sum hækkingin av partapeninginum er skrásett í Skráseting Føroya. Nýggi partapeningurin fær onnur rættindi sum partaeigari í felagnum tá skráseting av kapitalhækkingini er farin fram í Skráseting Føroya.
12. Kostnaður felagsins í sambandi við hesa kapitalhækking fer ikki uppum kr. 250.000,00 og fevnir slíkur kostnaður um lýsingar, skrásetingargjald, advokatkostnað, grannskoðarakostnað v.m.
13. Sum liður í kapitalhækkingini verður talið "77.634.000" í § 3 í viðtøkum felagsins broytt til talið [77.634.000 + ta upphædd endaliga verður teknað í sambandi við hesa viðtiknu kapitalhækking].

Kursurin er ásettur við støði í tí ótryggleika, ið valdar um felagið og virksemi tess, serstakliga havandi í huga, at sera trupult er at fáa javnvág í rakstur felagins nú eftir keypið av nýggju "Norrønu". Felagið hevur soleiðis roknskaparárini 2003 og 2004 havt munandi hall. Felagið er í holt við eina umlegging av rakstri sínum og eru soleiðis nógv viðurskifti í felagnum, greiða má fáast á. Óvissa valdar eisini um handilsvirðið á ognum felagsins. Talan er soleiðis ikki um nakran favørkurs, men marknaðarvirðið. Fortekningarrættur er lutvíst settur til viks, tí felagið metir í verandi støðu trupult at seta upp ta skjalatilfar neyðugt er, skal partapeningur verða boðin til tekningar við vanligum fortekningarrætti.

Viðkomandi, ið ynskir at nýta rætt til at tekna partapening, skal í tekningartíðarskeiðnum frá týsdegnum 28. juni 2005 til og við 30. september 2005 kl. 16:00 (føroyska tíð) venda sær til høvuðsskrivstovu felagsins J. Broncksgøta 37, 100 Tórshavn, har tekningarlistar eru tøkir. Sama er galdandi, um fortekningarrættur ynskist nýttur, tó so, at her byrjar skeiðið fyri nýtslu av fortekningarrætti tá henda lýsing stendur í bløðunum, hetta samsvarandi ásetingunum í § 34 í partafelagslógini og rennur hetta skeið eisini út tann 30 september 2005 kl. 16:00 (føroyska tíð).

Viðtøkur felagsins, tilfar eftir ásetingunum í § 29 stk. 2 í partafelagslógini, herundir viðtikni roknskapurin til aðalfundin og frágreiðing nevndarinnar og annað tilfar eftir ásetingunum í § 33 A í partafelagslógini liggja somuleiðis frammi á skrivstovu felagsins í sambandi við tekningina.

**Nevndin**

SMYRIL LINE

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin

-har tað hendir

Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin Sosialurin